Í kvøld kl. 22[10]

Hevur spælt við í 150 filmum

Tað er Svend Aage Lorentz, sum skipar fyri sendingini um Ove Sprogøe, kenda danska sjónleikaran. Hann hevur havt ein týðandi leiklut innan filmslistina síðan 1946, tá hann á fyrsta sinni royndi seg í hesi yrkisgrein.

Ove Sprogøe sigur í sendingini frá samstarvinum, hann hevur havt við aðrar sjónleikarar, eitt nú Dirch Passer í »Ved Kongelunden« í 1953 og »Det var på Rundetårn« í 1955. Frá byrjanini í 1946 og fram til okkara tíð hevur Ove Sprogøe spælt við í 150 donskum filmum. Hann greiðir í sendingini frá samstarvinum við Erik Balling, filmstjóra, sum hevur havt ein týðandi leiklut innan seinnu filmar hansara. Serliga væl er Ove Sprogøe kendur fyri leikpartin Egon í »Olsen-Banden« filmunum, har hann er serkønur í innbrotum, sum ongantíð eydnast.

Ove Sprogøe er ein av kendastu sjónleikarunum á danska sjónleikhúspallinum, eins og hann eisini hevur spælt meira álvarsamar leikpartar, eitt nú í »Den forsvundne fuldmægtig«, eftir skaldsguni hjá Scherfig, sum var innspældur í 1971.





Í kvøld kl. 22[55]:

Lagnusøgur

— Eru tygum ólukkulig, so ber til at fáa hetta í rættlag. Soleiðis var orðingin í eini lýsing, sum Parker Pyne hevði latið prentað. Maria er ólukkulig kono við ótrúgvum manni. Hon setir seg í samband við Parker Pyne, sum gevur henni viðgerð.

Øll gerast bilsin av, at viðgerðin fekk avleiðingar fyri Mariu, — ikki minst ótrúgvi maður hennara.

SV-aktuelt kl. 20.30

Fyrsta álopið — eitt bank uppá hurðina

Í hesum døgum sita nakrar familjur í Apealanch-erbjørgunum og brodera eitt áklæði, sum skal vera ein gáva til sovjetborgarar í Býnum Klintsy. Amerikanarnir fóru undir hetta arbeiðið, tá teir hoyrdu, at fólk í grannabýnum Asheville arbeiddu fyri at gerast vinarbýur við Klintsy.

Jørgen Flindt Petersen, danski sjónvarpsmaðurin hevur verið í Asheville, gjørt sending um tað sum hendir har og hvørji menniskju arbeiða við í tiltakinum.

Eitt av endamálinum við áklæðinum er at sleppa til Sovjetsamveldið at handa gávuna til borgararnar í Klintsy. Um hetta eydnast fer TV-aktuelt at gera eina sending um hesa vitjanina.

Endamálið er at fáa samrøður í lag við borgarar í einum landi til annað, — uttanum stjórnarleiðslurnar.

Kina


Hetta er onnur sending í trimum pørtum. Hon gevur innlit í gerandisdegnum hjá trimum ymsum familjum og menning teirra seinastu árini.

Í dag er nýtt fyribrigdi í Kina, sum nevnist ábyrgdarskipanin. Henda áleggur tí einstaka at gera persónligar royndir, sum hevur við sær, at vælferðin veksur.

sjónvarp

Týsdagin 28. august

19.30 *Radisurnar*
20.00 *Dagur og vika*
20.30 *SV-aktuelt*
21.15 *Kina 2 (3)*
22.10 *Ove Sprogøe á filmi*
22.55 *Lagnusøgur*
23.10 *Liðugt*



Olympiska flóðaldan

Tað eru eftirverkirnir av Olympisku summarleikunum í USA og donsku summartíðini sum heild, ið nú myndar seg á sjónvarpsskerminum í Føroyum.

Langar og leiðiligar sendingar hava verið í seinastuni, og í stórum bert sendirøðir. Hesar binda hyggjaran til stovuhornið, har hann situr og starir seg blindan á Frank Buck, amerikanarnar sum á fyrsta sinni royndu seg í Olympiaduni, ein onnur sending um søguna innan sama fyribrigdi, danskir sjónleikarar sum skapa sær í summarhitanum o. s. fr., o. s. fr. Tó skal sigast, at sendirøðin um buskmenn er sera áhugaverd og so hugnaliga friðarlig í øllum hinum rokinum.

Viðvíkjandi danska skapinum, so hevur tað nú fingið slíkar hæddir, at studioverturin ikki veit sínt livandi ráð. Løgið at áskoðararnir sita so stillir og lata seg undirhalda av sjónleikarum, sum bert hava eitt fyri eygað. — at lata seg eygleiða. Ein góður sjónleikari hevði ikki ført seg soleiðis fram . . . men . . . men, sjónleikur sum yrki er eitt harðrent arbeiði, og tá *ein* skapar sær nógv, skal annar skapa sær *meira*. Tað er so tað, sum danska sjónvarpið bjóðar hyggjarunum — og sum vit so enn einaferð nýta gott ella ringt av!

Lukkutíð at sjónvarpið byrjar við barnatimanum og síðan fer yvir til »Dagur og vika«. Her fáa vit tíðindi og vitan um, hvat hendir í Føroyum. Myndagóðskan og tilrættisleggingin er avbera góð, og tað er einki at ivast í, at henda sending, — tá árið er av — verður best umtókta sending — um sjónvarpið fer undir at gera veruligar kanningar. Einstøku lesarabrøvini, tó at tey eru nógv í tali, sýna helst ikki allan sannleikan, so sum hesin myndar seg í bløðunum nú.

Serliga áhugavert var at fáa fram sjónarmiðið um HF og studentaskúlan í Eysturoynni. Her er vansin við trætuni um, hvar stovnurin skal byggjast, at tað fer at seinka útbyggingina. Tað fær avleiðingar fyri undirvísingina og næmingar og lærarar sum heild, og tað er tó eitt sjónarmið, sum øll mugu skilja krevur eina loysn, eisini hjá teimum, sum hava hetta økið um hendur. Og so slapp nýggi skúlin í Porkeri eisini upp í part, og tað var helst onkur sum var fegin um.

Landsdjóralæknin varð spurdur um kettufellurnar og rilluskriðan, sum seyður í Føroyum nú hevur fingið. Aftaná var farið nágreiniligari um hetta fyribrigdi í sending fyri seg, men har kom ikki serliga nógv fram, sum ikki var sagt framm-anundan. — Jú, vit fingu mynd av seðyi, sum var sjúkur, og tað er góð upplýsing fyri bóndur, sum kunnu siggja, hvussu sjúkan ávirkar seyðin.

Filmurin um kendu sjónleikarkvinnuna Fedoru var framúr góður og spennandi eisini. Hesin filmur er tann í seinastuni, sum hevur verið mest áhugaverdur. Væl spældur, dramatiskt væl uppbygdur, góð fotografering.

Vónandi fjarar nú olympiska flóðaldan av, so tað verður okkurt annað at hyggja at í sjónvarpinum, sum ikki bert hevur við tøl og kappingar at gera.

Dagny Joensen